Planet



Barbara Holm
barbara@sosialurin.fo

# Sidney Lee leysur í Føroyum



**REALITY** Brúni krígsmaðurin Sidney Lee verður leysur í havnargøtum um 10 dagar

Barbara Holm

Størsta realitystjørnan í danska kongaríkinum, Sidney Lee, verður leysur í havnargøtum 16. og 17. apríl, har hann verður gestur í Hvonn Live og í REX.

Hann telist millum tey fáu fólkini í heiminum, sum eru vorðin landskend bara upp á sína persónligheit, og hann er typan, sum fólk elska at hata.

Ósmæðin hevur hann ferð eftir ferð víst síni vikuligu skorirituali í landsdekkandi sjónvarpi, og tað er ikki av ongum, at hann verður róptur »sjálvbrúni krígsmaðurin«.

Einamest er hann kendur frá realitysendirøðini »Single liv«, har hann viku aftan á viku hevur víst donskum monnum, hvussu teir skulu skora kvinnur.

### Danska útgávan av Paris Hilton

Sidney Lee hevur sligið met í Danmark fyri at hava luttikið í flestum sendirøðum í donskum sjónvarpi, allar sokallaðar reality-sendirøðir.

Hann sigur seg verða eitt »miðlafenomen« og er púra avgjørdur um, at hann er danska útgávan av Paris Hilton.

Hann er ógvuliga hugtikin av amerikanska málinum, og hansara danska mál er nógv merkt at amerikonskum »slangorðum«.

### Miseydnað roynd sum pornostjørna

Fyri umleið einum ári síðani fekk danski slaturmiðilin, Se og Hør, fatur á pornomyndum við realitystjørnuni. Hann hevði eftir øllum at døma eisini roynt seg í pornoídnaðinum, men vantandi góðska á filminum var orsøkin til, at tað ikki eydnaðist honum at gerast tað stóra nýggja navnið innan hendan heimin.

Við Se og Hør segði danski pornoinstruktørurin, Allan Andersen, at Sidney Lee dugdi ikki til pornoheimin, og tí bleiv bara ein upptøka gjørd við honum.

### Leysur í Føroyum

Tey flestu mugu vita, hvat realitystjørnan tekst við um vikuskiftini í Keypmannahavn, og spennandi verður at síggja, hvat sjálvbrúni krígsmaðurin finnur uppá, tá ið hann verður leysur á havnargøtum 16. og 17. apríl.

Við vissu kann so staðfestast, at Sidney Lee verður gestabarrvørður í REX fríggjakvøldið 16. apríl, og leygarkvøldið 17. apríl verður hann gestur í sendingini hjá Rás2, Hvonn Live.

*barbara@sosialurin.fo*